Leikrit á Interneti

Nú ber til um Internetið at fáa eitt yvirlit yvir føroysk leikrit og leikrit, sum eru týdd til føroyskt.

Tað er Sverri Egholm, sum í samstarvi við Landsbókasavnið og onnur hevur savnað og lagt hetta yvirlitið til rættis.

Internet-útgávan av yvirlitinum Leikrit er skipað í tveimum, við einum rittulyvirliti og eini høvuðsskrá. Í tittulyvirlitinum ber til at leita eftir leiktitlum, og í høvuðsskránni, sum er skipað í bókstavarað eftir høvundi, eru fleiri upplýsingar um tað einstaka leikritið, til dømis hvør, ið hevur týtt, hvussu nógvir leikarar eru, og nær og hvar leikurin hevur verið framførdur.

Leikrit á Interneti eru et finna á heimasíðuni hjá Føroya Landsbókasavni á hesi adressu:

http://www.sleipnir.fo/flb/flbheim.htm

ella beinleiðis á adressuni:

http://www.sleipnir.fo/flb/leikrit.htm.

Á heimasíðuni hjá Føroya Landsbókasavni liggur annars ymiskt til kunningar, til dømis hentar upplýsingar um savnið, ymist um ISBN-skipanina og nakrir bókalistar. Í tilknýti til heimasíðuna er eisini eitt umfatandi og sera hent leitiyvirlit til Internet. Hetta yvirlitið hevur adressuna:

http:/www.sleipnir.fo/fo/flb/flbint3.htm.

Broyttu Føroyar

– nú eisini í Suðuroynni

Almenna fyrilestrarøðin, sum Fróðskaparfelagið og Fróðskaparsetrið hava skipað fyri í vetrarhálvuni, verður nú eisini at hoyra í Suðuroynni.

Tá ið suðringar ongar møguleikar hava fyri at fylgja hesum fyrilestrum í Havn, hevur Suðuroyar Tjóðveldisfelag tikið stig til at fáa fyrilestrarnar suður hagar. Hildið verður, at flestu teirra eru sera áhugaverdir og viðkomandi, og at tað tí er spell, at hesir bara skulu hoyrast í Havn.

Fyrstu fyrilestrarnir verða onsdagin í komandi viku, 29. januar, kl. 19.30, og verða tað:

Karen Heinesen: Broytingin í livikorunum og **Karin Strøm: Rúsevni og fyribyrging.**

Hesir fyrilestrar verða at hoyra í aulini í Vágs skúla.

Aftan á gevst fundarfólkinum høvi til at taka lut í orðaskiftinum um hesi evni.

Suðuroyar Tjóðveldisfelag vónar, at áhugi er millum suðringar fyri at fáa lut í tí sum fyriferst her á landi, og fer tí m.a. at royna hesa fundarrøðina.

Sagt verður frá felagnum, at øll, ið hava áhuga fyri fyrilestrunum, eru hjartaliga vælkomin.

Spæla borðtennis í Havn um vikuskiftið

Næsta umfar í FM-kappingini fyri lið í borðtennis verður spælt í Havn um vikuskiftið.

Kappingarnar vera allar í Badmintonhøllini í Gundadali.


Piltar, smádreingir, pinkur og smágentu møta leygardagin kl. 9.00, og dreingir og genutr kl. 13.00

Sunnudagin kappast unglingar, kvinnur, meðaldeild og meistaradeild, og allar deildir møta kl. 13.00

Triðja og seinasta FM-umfar fyri lið verður spælt á Tvøroyri leygardagin 22. februar og sunnudagin 23. februar, og tvær vikur eftir tað verður FM í ein- og tvímansleiki.

ek

Barna- og ungdómstelefonin
hjá Barnabata/Reyða Krossi svarar mánadag frá kl. 16–18. Tlf. 10645.



© Ees. 1997

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Margit Hansen, Borgediget 25 st.tv. DK-4000 Roskilde

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: POCAHONTAS

T	O	M	A	H	A	W	K		F		P	A	G	A	J
A	L	A	B	A	M	A		K	A	L	E	V	A	L	A
N	A	I	R	O	B	I		I		U	N	I	K	U	M
N	V		A	M	I	G	O		K	I	S		K	M	E
S	U	M		A		A	N	N	A		U	M		I	S
Í	R	A	R		S	T	O	L	T		M	I		N	F
Þ			ø	M					R	A		L	Y	A	C
S	Y	N	D	A	F	L	Ó	Þ	I	N			D		O
T	E	N	D	R	A		Þ		N	N		L	U	D	O
I	R			N	L		I	F		T		K	N	E	P
G	M	O	H	I	K	A	N	A	R	I	N			L	E
P	O		E		O	N		R			O	N	G	A	R
I		S	L	E	Y	G	A		O	N	S	L	O	W	
100	C	H	I	N	G	A	C	H	G	O	O	K		A	N
B	L	A	U		D		T		U	T	B		ø	R	N
I		G	M		I	M	A	T	R	A		S	T	E	N

Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

101

Loysunarorðið:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmáljð 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya-1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR